# Fakfelagsformaðurin uppsagdur

**Formaðurin i Skála Handverkarafelag er uppsagdur á Skipasmiðjuni á Skála við teirri grundgeving, at ov lítið arbeiði er. Uppsagdi formaðurin sigur, at talan er um hevndaratgerð fyri hansara fakliga virksemi**

UPPSØGN
*Edvard Joensen*



*Formaðurin í Skála Handverkarafelag varð koyrdur til hús av skipasmiðjuni, har hann síðan 1965 hevur arbeitt við undantaki av fýra árum. Skipasmiðjuleiðslan sigur grundina vera ov lítið arbeiði á skipasmiðjuni. Maðurin sjálvur sigur grundina vera hevnd fyri fakligt virksemi*

Formaðurin í Skála Handverkarafelag er sagdur úr starvi á Skipasmiðjuni á Skála. Almenna grundgevingin frá leiðsluni er, at ov lítið arbeiði er á skipasmiðjuni. Sjálvur heldur maðurin, at hansara fakliga virksemi nú hevur kostað honum starvið.

Formaðurin í Skála Handverkarafelag, Harald Østerø, ivast ikki í, at tað eru fakfelagsviðurskifti, sum hava gjørt, at hann er koyrdur til hús av skipasmiðjuni.

Hann hevur fleiri ferðir sum formaður í Handverkarafelagnum verið eftir skipasmiðjuleiðsluni fyri ikki at halda allar avtalur, sum gjørdar eru í sáttmálasamráðingum. Eisini vísir hann til eitt sakarmál, sum Føroya Handverkarafelag, vegna Skála Handverkarafelag, hevur lagt móti skipasmiðjuni fyri ein lim, sum eisini varð uppsagdur. Skipasmiðjan tapti sakina og hevur kært til landsrættin.

– Alt hetta samanlagt meti eg vera minst líka stóra grund til uppsøgnina sum tað, at einki arbeiði er á skipasmiðjuni, sigur Harald Østerø.

## Sáttmálabrot

Harald Østerø sigur, at tað hevur verið framt sáttmálabrot í fleiri førum frá leiðslunnar síðu.

Til dømis eru menn frá skipasmiðjuni bidnir um at fara til arbeiðis aðrastaðni enn á sjálvari skipasmiðjuni. Eitt nú umborð á skip, sum hava ligið í Fuglafirði.

Fyri slíkt arbeiði er greitt tilskilað, at skipasmiðjan skal bera kostnaðin av flutningi, umframt at menninir eiga rætt til kost, meðan teir eru útstationeraðir.

Men tað hevur leiðslan ikki gjørt, og í meira en einum føri hevur fakfelag teirra, Skála Handverkarafelag, sum hevur verið umboðað av formanninum, verið eftir leiðsluni og hartað hana fyri hetta.

Eisini varð ein maður burturvístur av skipasmiðjuni, uttan at hann fekk møguleika fyri løn ella arbeiði í uppsagnartíðini. Tað er eisini sáttmálabrot sambært formanninum í Skála Handverkarafelag. Og tað heldur Føroya Rættur eisini.

Skála Handverkarafelag sendi málið til meginfelag sítt, Føroya Handverkarafelag, sum stevndi skipasmiðjuni og fekk viðhald í Føroya Rætti. Skipasmiðjan hevur kært málið til landsrættin, sum enn ikki hevur tikið støðu. Tískil hevur burturvísti maðurin heldur einki oyra fingið av tí, hann og felag hansara meta hann hava rætt til.

## Semja

Málið um uppsagda handverkaraformannin á Skála hevur verið viðgjørt á fundi millum Føroya Handverkarafelag og eigararnar av skipasmiðjuni, framtaksfelagið Notio, týskvøldið og mikunáttina.

Harald Østerø, formaður í Skála Handverkarafelag, sigur, at har varð gjørd ein avtala, sum hann kann góðtaka.

Hann er sagdur úr starvi við teirri grudngeving, at ov lítið arbeiði er á skipasmiðjuni, men hann fær løn í uppsagnartíðini, sum er tríggjar mánar. Og tí kann hann liva við, sigur hann.

Men hann metir framvegis ikki, at grundgevingin, at ov lítið arbeiði er, er tann rætta. Hon er eftir hansara meting einans tann, at hann hevur verið ov aktivur í fakfelagsarbeiði sínum.

Formaðurin í Føroya Handverkarafelag, Poul Øregaard, sigur at tað varð gjørt greitt á fundinum við skipasmiðjuleiðsluna, at felagið fór at seta tiltøk í verk, um ikki ein avtala fekst, sum var eftir sáttmálanum.

## Onga viðmerking

Gunnar Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála, vil ikki gera viðmerkingar til málið.

Hann sigur bert, at nú er avtala gjørd, og at talvan er viskað, og nú verður hugt frameftir.

Tá hildið verður upp fyri honum, at grundgevingin um manglandi arbeiði ikki verður hildin at halda, tí stórarbeiði beint nú skal gerast við Krúnborg, sum í skrivandi løtu er á veg inn í dokkina á Skála at skifta gronina út, sigur Gunnar Mohr, at tað sleppa ikki allir menninir á Skála fram at Krúnborg.

Hann vil heldur ikki gera viðmerkingar til málið um útstationeringarnar, sum skipasmiðjan ikki vildi gjalda fyri.

Tá hann verður spurdur, um tað er rætt, at hann í kaffisteðginum hjá arbeiðsfólkinum hevur verið í kaffistovuni og menninar teir við, at um teir ikki gevast nú og makka rætt, verður alt arbeiðið á Skála flutt til Havnar, er svarið tað sama:

»Absolutt onga viðmerking«.

# Skipaeftirlitið byggir út

**Tað er ov trongligt í bygninginum, sum Skipaeftirlitið heldur til í í Miðvági. Bygt verður upp í oman móti sjónum**

PLÁSSTROT
*Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Gamla Smiðja í Miðvági er ov trong til virksemið hjá skipaeftirlitinum. Tí verður bygt uppí.

Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum, sigur, at ymsar broytingar skulu gerast í innrættingini av bygninginum. Millum annað skal stór skjalagoymsla gerast í kjallaranum.

Neyðugt verður so at flyta eitt nú matstovuna, og einasti háttur at finna pláss er at byggja uppí, sigur stjórin.

Tá leigumálið varð gjørt, varð álitið um trygd á sjónum fylgt, sigur hann, men hædd varð ikki tikin fyri øllum teimum mongu skjølunum, sum hoyra til stovnin og sum krevja eina rættiliga stóra skjalagoymslu, greiðir Óli Hans Hammer Olsen frá.

Umframt hava vit so eisini reglugerðina um tilbúgving móti yvirgangsatsóknum, sum millum annað krevur eitt avlæst rúm, har ikki hvør sum helst hevur atgongd. Hvat goymt verður í slíkum rúmi, vil Óli Hans Hammer Olsen ikki geva minstu ábending um.

Tað er eigarin av bygninginum, sum stendur fyri útbyggingini.



*Bygt verður upp í Gomlu Smiðju, sum er ov lítil til virksemið hjá Skipaeftirlitinum*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Fólkaflokslistin klárur



*Valevnini, sum nú skulu royna at vinna atkøvður. Á myndini vænta: Tommy Næs Djurhuus, Eyðfinn Lenvig og Jógvan Thomsen*

**Mánakvøldið varð endaligi valevnislistin hjá Fólkaflokkinum í Havn**

UPPSTILLIN
*tíðindaskriv*

Havnar Framburðsfelag hevði mánakvøldið 2. og 3. uppstillingarfund til býráðsvalið. Eini hálvthundrað fólk vóru møtt til fundin, og vónirnar hjá fólkaflokkinum eru góðar undan býráðsvalinum havandi í huga, hvat flokkurin hevur avrikað hesi seinastu fýra árini, ið hann hevur sitið við róðrið í Tórshavnar Býráð. Á fundinum varð valevnislistin endaliga góðkendur, og flokkurin hevur 17 valevnir, trettan mannfólk og fýra konufólk, sum bjóða seg fram til býráðsvalið.

Samanumtikið kann sigast, at talan er um eina góða blanding av bæði yngri og eldri, eins og royndum og óroyndum býráðspolitikkarum. Harafturat kann sigast, at á listanum eru fólk bæði av Signabø, úr Nólsoy og úr Hesti. Tey 17 valevnini, sum stilla upp fyri Fólkaflokkin til býráðsvalið í Havn 9. november eru hesi: Jan Christiansen, Inga Dahl, Tommy Næs Djurhuus, Maria á Dul, Tummas í Garði, Erna Háberg, Hjørleif Hjaltalin, Vagnur Johannesen, Eyðfinn Lenvig, Heini Magnussen, Bjarti Mohr, Terji Nielsen, Annika Olsen, Sjúrður Olsen, Páll Petersen, Jógvan Thomsen og Egon Øregaard.

# Sera góði massasjustólurin, Dr. Magic

MASSASJA
*Tíðindaskriv*

Ert tú stívur í kroppinum, hevur vøddaspenningar ella ert plágaður av pínu, so er nakað nýtt og spennandi komið til Føroya: Massasjustólin Dr. Magic, sigur Beinta Lassen frá Ergo & Hjálpar-tólum

Tí har hava tey eitt »Relax room«. Í hálvtannað ár hava tey bjóðað viðskiftafólki massasju í sera framkomnum massasjustólum og hugnaligum umhvørvi.

Men nú er Dr. Magic komin til Føroya sum tann fyrsti og einasti. Dr. Magic hevur ein innbygdan telduskerm, sum vísir, hvussu kroppurin hjá tær hevur tað, hvar og hvussu nógvir vøddaspenningar eru.

Stólurin vísir kroppin hjá tær alla tíðina, meðan hann masserar, so tú sært á skerminum um tínir spenningar eru blivnir upploystir.

Beina Lassen, sum er ergoterapeutur, hevur í tøttum samstarvi við danir verið kring knøttin og leitað eftir tí besta massasjustólinum, og úrslið er so Dr. Magic.



*- Tað, sum sermerikir hendan stólin, er millum annað, at hann finnur akslahæddina hjá tær, sigur Beinta Lassen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Nógvir massasjustólar finnast og í ymsum prísflokkum, men sum viðgerðarstórlur er Dr. Magic tað besta av tí besta, sigur Beinta Lassen.

- Tað, sum sermerikir hendan stólin, er, at hann finnur akslahæddina hjá tær. Sendir nakrar fingrar út so at hann veruliga kann taka fatt. Hann gevur zoneterapi til føturnar og so sjálvandi tekduskíggin.

- Stólurin gevur massasju til allan kroppin, nakka, rygg, lendar, bein og føtur. Tú kanst velja millum ymisk sløg av massasjum, sigur Beinta Lassen.




FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026



Móttøka og opið hús á
Landssjúkrahúsinum

**Fríggjadagin 1. oktober kl. 14 - 17** verður almenn móttøka í nýbygninginum á Landssjúkrahúsinum.

**Leygardagin 2. oktober frá kl. 13 - 16** er opið hús í nýggja bygninginum. Starvsfólk á Landssjúkrahúsinum fara at greiða frá virkseminum á teimum fimm nýggju hæddunum og eisini verður ein framsýning. Við fyribyrgjandi átøkum í huga, fara vit harumframt at bjóða teimum vitjandi einfaldar mátingar av heilsustøðuni.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabosgøta, 100 Tórshavn, Tel +298 30 45 00, Fax +298 31 00 64, www.lsh.fo
www.sansir.fo